**Formansfrágreiðing AKF - aðalfundur 2022**

Síðani síðsta aðalfund hevur nevndin í AKF verið henda: Páll Nolsøe, (MAG) formaður, Anton Arge (FBF) næstformaður, Gunn Møller (FVF) kassameistari, Robert Thomassen (ARK) skrivari og Birita L. Jóansdóttir (FFS) nevndarlimur.

Tað merkir virksemið hjá felagnum, at AKF nú hevur fólk í starv og eina skrivstovu. Vit eru sera fegin um at hava Ingibjørg Berg í starvið sum aðalskrivari, og tað er ein stórur styrkur fyri okkum sum felag.

Talið av fyrispurningum frá limum og øðrum er eisini vaksið nógv síðani vit fingu skrivstovu, og tað ber boð um, at limir uppliva, at tey í nógv størri mun kunnu gagnnýta felagið, og fáa nyttu av at vera í einum fakfelag.

Royndirnar við at hava sett fólk í starv vísa, at tað ikki bara er ein stórur fyrimunur at hava fólk í starvi. Tað er eisini eftir mínum tykki alneyðugt fyri okkum sum felag at hava fólk í starvi, so vit sum felag kunna lyfta uppgávuna at vera eitt fakfelag, tað sum tað inniber og sum okkara limir tørva, og eisini vænta. Vit mugu eisini hava í huga, at AKF er vorðið eitt av teimum størstu fakfeløgunum í landinum, og limafeløg sum líknandi tal av limum hava uppí fleiri fólk í starvi.

Royndirnar seinasta árið hava víst, at arbeiðsbyrjan hjá aðalskrivaranum er vaksin. Nevndin og forfólkini í limafeløgunum avgjørdu tí á fundi í mars at seta starvsbrøkin hjá aðalskrivaranum upp frá hálva tíð til trífjórðings tíð frá 1. mai 2022 til 1. januar 2024, í fyrstu siftu.

Við ársbyrjan var samlað limatalið í limafeløgunum í AKF uml. 700 limir. Í 2010 var limatalið 400, so limatalið er vaksið støðugt seinnu árini. Í hesum sambandi er týdningarmikið at hava í huga, at AKF er eitt meginfelag við fimm limafeløgum. Orsøkin til vaksandi limaskaran stendst uttan iva eisini av, at talið av akademiskum størvum er vaksandi. Men eg ivist onga løtu í at vaksandi limatalið stendst av, at limirnir uppliva týdningin og nyttuna av at vera limur í fakfelag. Í hesum sambandið eiga ikki minst nevndirnar í limafeløgunum stórt rós fyri teirra arbeiði og stóran heiður fyri vaksandi limaskaranum.

Tað tykist eisini at vera breið semja millum limafeløgini um at samansjóða limafeløgini meira. Uppskot hevur verið nevnt um, at limafeløgini næsta ár leggja aðalfundin sama dag, og hava eitt felags borðhald í hesum sambandi.

Tað er sjálvsagt hugaligt at uppliva eitt felag í vøkstri. Ikki minst í eini tíð har onnur fakfelag uppliva limafráfald, ikki minst í grannalondunum, og røddir eru um, at fakfelagsrørslan er í vanda fyri hóttafalli.

Men vit mugu eisini hava í huga, at vit støðugt mugu menna okkum sum fakfeløg. Tí er ein ‘professionalisering’ av okkum sum fakfelag neyðug, og at limirnir uppliva, at tað er greiðir fyrimunir í at verða limir í okkara fakfeløgum. Tí vit mugu verða føra fyri at fáa nýggjar limir.

Tað hevur leingi verið ætlanir um, at arbeiða fyri at fáa limaágóðar. AKF og limafeløgini høvdu fund herfyri og eru farin undir ein tilgongd at fáa eina røð av limaágóðum. Fyrsta stig er at fáa gjørt eitt limakort sum kann nýtast sum dokumentatión, og hetta kemur á skrá seinni á aðalfundinum.

Eisini ætla vit at taka upp samband við Vinnuhúsið í heyst um okkurt slag av avtalu fyri privata arbeiðsmarknaðin, sum skipar setanarviðurskiftini fyri okkara limir á privata arbeiðsmarknaðinum betri. Vit vilja í hesum sambandi fegin hoyra frá limafeløgunum, áðrenn summarferiuna hvørja viðurskifti er mest umráðandi at fáa skipað hjá privat settum.

**Nevndararbeiði og virksemi hjá skrivstovuni síðsta árið**

Sonevnda Bókavørðamálið hevur fylt nógv á nevndarfundum, og er nú partvíst loyst við tað, at

kandidatarnar verða umflokkaðir til AKF-sáttmálan. Málið v.v. teimum við gomlu bókavarðaútbúgvingini heldur fram.

Nakað av tíð og orku er farin til at skipa álitisfólkini betur:

- Vegleiðing er gjørd við støði í avtaluni við FMR
- Álitisfólkaval hevur í mars/apríl
- Tiltak verður í mai fyri álitisfólkum og skeið seinni í ár
- Hesir stovnar hava higartil valt álitisfólk: Landsverk, FT, Tórshavnar kommuna, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Sernám, Havstovan og partvíst Setrið

Vit merkja væl, tá stovnar hava álitisfólk, t.d. Landsverk, Setrið, Sernám og HFS, tí málini ganga lættari
Vit vilja gjarna hava boð, um álitisfólk eru, sum vit ikki vita um.

Landsverk hevur fylt nógv, serliga fyrra part av skeiðum. Fleiri fundir og skriving hava verið við leiðsluna um mál, og felagið hevur viðmerkt ymiskt á stovninum, t.d. hava vit viðmerkt og spurt inn til størv, sum eru lýst leyst, og at stovnurin tyktist at niðurlaga landsarkitektafunktiónina. AKF er saman við Starvsfelagnum og BLF komi ásamt um at senda formansskapinum í Løgtinginum áheitan um at steðga og átala, tá starvsfólk verða spilt út á talarastólinum, har útsagnirnar hjá Jóhan Dahl um Landsverk verður nýtt sum dømi.

Vit hava havt fundir við Lønardeildina um ymisk mál t.d.: Siglandi limir (óloyst), autorisaiónsviðbótina hjá sálarfrøðingum (er í gongd, samd um at finna leist), projektsett fólk og tíðaravmarkaðar setanir (er í gongd, samd um at finna leist), meting av útbúgvingum.

Onnur mál og fyrispurningar, sum nevndin hevur viðgjørt eru m.a.:

- Sjálvboðið arbeiði á søvnum
- Barnsburðafarloyvi og løn – serliga hjá pápum
- 6. frívikan – starvsfólk eigur avgerðina um hon kal haldast ella rindast úr, persónligt ikki generellar reglur
- Áhaldandi tíðaravmarkaðar setanir
- Limamál av ymiskum slag

Skrivstovan verður nógv brúkt – millum 2-12 mál um vikuna. Talan er um alt frá ítøkiligum fyrispurningum um lønarsatsir til stór og trupul mál, sum varða longri t.d. uppsagnir, viðbøtir, ymisk rættindi og sáttmálar á privata arbeiðsmarknaðinum.
Hyggja vit eftir, hvørji øki brúka skrivstovuna, so er býtið millum alment og privatsett javnt, og býtt á fleiri ymiskar stovnar og arbeiðspláss. Fleiri arbeiðsgevarar ringja eisini um ymiskt t.d. feriu, frítíð, løn og eftirløn – og tey spyrja um vit hava sáttmálauppskot, tey kunnu brúka. Hetta ber greitt boð um at tørvur er at fáa meira skipaði viðurskifti fyri okkara limir á privata arbeiðsmarknaðinum.

**AKF er partur av Fakfelagssamstarvinum og samstarvið styrknað**
Samstarvið víðkaði 1. januar 2022, tá Heilsuhjálparafelagið gjørdist partur av samstarvinum, sum nú fevnir um enn størri part av almenna arbeiðsmarknaðinum.

Vit uppliva greitt, at Fakfelagssamstarvið saman hevur eina sterka rødd. Hetta vísir t.d. tá vit velja limir í nevndir, ráð og stýri t.d. fingu vit limin vit peikaðu á til bæði valnevndina og nevndina í Fasta gerðarættinum, í ALS-stýrið og í Arbeiðsumhvørvisráð (her var Annika Helgadóttir, táverandi forkvinna í Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar vald).

Sum heild meti eg, at tað er neyðugt at luttaka í hesum samstarvi fyri at fáa eina slagkraft - ikki minst mótvegis politisku skipanini - sum AKF ikki hevur tá tað stendur sjálvt. Eg meti eisini, at hetta samstarvið um tað heldur fram at mennast kann verða avgerandi fyri at menna og styrkja um føroysku fakfelagsrørsluna.

Tveir limafundir, har nevndirnar og umsitingarnar í feløgunum samstarvinum luttaka, hava verið, har arbeitt serliga hevur verið við at finna greiðari fokus í samstarvinum.

Nýggj avtala/viðtøkur fyri samstarvi eru samtyktar. Reglugerð fyri mannagongdir fyri marknatrætum er samtykt. Við marknaðartrætum meinast við ivamál og stríðsspurningar um hvat sáttmálaøkið og fakfelag starvsbólkar hoyra undir. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av tvídráttinum millum AKF og Starvsfelagið um sáttmálaøki fyri bókavørðar.

Eisini orðar og ger Fakfelagssamstarvið felags hoyringsskriv til lógaruppskot, sum viðkoma limunum. Tó, hetta tað eitt sindur ymiskt – AKF hevur eisini viðhvørt gjørt sítt egna hoyringsskriv. Hesi verða løgd á heimasíðuna, tá hon er klár.

Stór felags mál, Fakfelagssamstarvið hevur arbeitt við, eru serliga:

- 37 tímars arbeiðsvika
- Sálarligt arbeiðsumhvørvi
- Starvsfólkapolitikkur landsins.

**Limafundir**
Nevndin í AKF hevur skipað fyri sonevndum limafundum, har nevndin í AKF og nevndirnar í limafeløgunum hittast. Tveir limafundir hava verið, har serliga hesi mál vórðu viðgjørd:

- Sáttmálaamráðingar
- Reglir/mannagongdir fyri rættarmál
- Búmerkið og heimasíðan
- Viðtøkubroytingar
- Dátuvernd

Eisini hevur nevndin í AKF havt tveir forfólkafundir við formonnum/kvinnum í limafeløgunum, har viðgjørt varð:

- Fyrireika limafund
- Limaágóðar
- Avtala við privata arbeiðsmarknaðin
- Seta starvsbrøkin hjá aðalskrivaranum upp

**Annað**
Ein fundur hevur verið við Yrkisfelagið Miðnám um limaskap í AKF. Málið var eisini viðgjørt á aðalfundi hjá YF Miðnám, men sum skilst var eingin niðurstøða annað enn at kanna møguleikan betur. AKF hevur einki formligt hoyrt aftur enn.

**Samráðingar**
Sáttmálin sum Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar hevði við Heilsumálaráðið varð uppsagdur í september, men vit bíða framvegis eftir samráðingum.

Nevndin er so smátt farin at fyrireika seg til sáttmálasamráðingar við FMR, sum væntandi fara í gongd til heystar, tá verandi sáttmáli gongur út.

**Ætlan fyri árið 2022**

- Sáttmálasamráðingar
- Sáttmálin millum Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Heilsumálaráðið
- Álitisfólkaskipanin
- Heimasíðan liðug í mai
- Dátuvernd/Journal
- Skriva nakrar greinar at sjónliggera AKF
- Barnsburðafarloyvi – serliga pápar – vit hava verið í samskifti við BLF um at leggja fram eitt ítøkiligt uppskot um hvussu feløgini halda at rættindi kring barnsburði ikki minst hjá pápum kunnu betrast.

**Serfrøðingaviðbótin**
Tá ið seinasti sáttmáli varð gjørdur kom serfrøðingaviðbótini, sum hevur verið eitt krav hjá AKF í mong ár, við í sáttmálan. Mótkravið hjá FMR var at lækka endastigið í bachelorstiganum, sum AKF so gekk á møti.

Síðani tá hevur spurningur verður reistur hvussu nógv hava og fara at fáa hesa serfrøðingaviðbót, og um AKF hevur goldið 'ov nógv' fyri hesa viðbót. Aðalskrivarin hevur kanna málið og vent sær til FMR og onnur stjórnarráð. Tað vísir seg, at bara ein serfrøðingaviðbót hagartil er latin, og ein onnur umsókn verður viðgjørd. Tað vísir at seg tó eisini, at hetta eru einastu umsóknir, sum FMR og stjórnarráðini hava fingið. Tískil er orsøkin, at ikki fleiri serfrøðingaviðbøtur eru lætnar, at so at siga ongar umsóknir eru. Tá kann tó eisini vera, at tað eru stovnsleiðarar ikki vilja ganga umbønum frá starvsfólkum um serfrøðingaviðbøtur á møti. Men tað er lítið sannlíkt, at hetta er orsøkin til manglandi umsóknirnar. Formaðurin hevur eisini verið í samband við BLF, og teirra royndir siga at tað tekur nakað av tíð, áðrenn glið kom á við at lata serfrøðingaviðbøtur. Tí er áheitanin frá AKF til limafeløgini og limir tess at troyta møguleikan fyri at fáa serfrøðingaviðbót. Tí um ikki verður biðið um hesa viðbót, so verður hon ikki latin.